# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra mamma, unnusta, dóttir og systir

**Elsi Petersen**
Oyrarbakki

andaðist 11. februar 26 ára gomul.

Jarðarferðin verður sunnudagin 15. februar kl. 13.30 úr Vesturkirkjuni.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ólavur, Rógvi, Súsanna, Hansy og Krista**

Tey, ið vilja minnast Elsi við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til sonin á konto í Føroya Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá ið elskaði sonur og beiggi okkara

**Karl Martin Smidt Jensen**
Oyri

so brádliga varð tikin frá okkum.

Ein serlig tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hava hjálpt okkum so væl.
Somuleiðis takka vit fyri stóra umsorgan og troystarrík orð.
Tøkk fyri blómur, kransar, uppringingar, brøv og peningagávur til Talvfelagið og Flogbóltsfelagið og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Dorit, Kjartan, Hans Erik og Pól Jóhannus**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Martin Fjørdal**
Tvøroyri

gjørdust sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Takk til starvsfólk á Hotel Tórshavn og til arbeiðsmannafelagið Fylking.
Takk fyri blómur og kransar,
takk til Jónsvein Bech prest, organist, sangarar, Brand Enni og til tykkum øll,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Hannedukkan, Bjarki og Hildur**

Arnhild Christiansen, Klaksvík:

## 25 ára starvsdag hjá Føroya Banka



Hanus Heinesen, deildarleiðari hjá Føroya Banka í Klaksvík, handar her Arnhild Christiansen ein málning í sambandi við 25 ára starvsdagin

Mynd: Solby A. Eliasen

Mánadagin 16. februar hevur Arnhild Christiansen 25 ára starvsdag hjá Føroya Banka í Klaksvík.

Arnhild er 44 ára gomul og úr Klaksvík, dóttir Astu og Ludvík Abrahamsen, bæði ættaði úr Oyndarfirði og búsitandi í Klaksvík.

Eftir lokið realskúlaprógv fór Arnhild í læru í Føroya Banka 1. september 1977 og bleiv útbúgvin bankaatstøðari í 1980. Hon hevði farloyvi frá bankanum eitt tíðarskeið frá 1987-89, so nú hálvan februar 2004 kann hon halda sín 25 ára starvsdag.

Arnhild var álitisfólk í bankanum frá 1992-2001 og nevndini í Starvsfólkafelagnum, sum er ein undirdeild hjá danska Finansforbundet frá 1995-2001.

Arnhild er gift við Kristian Christiansen úr Klaksvík, tey búgva í Klaksvík og eiga trý børn: Ludvík, 19 ár, Hilda, 15 ár, og Ásla, 12 ár.

Tórshavnar Kvøld-Ungdómsskúli, Kollafjørður:

## Onnur framsýning við »Spírandi list« í Smiðjuni



*Aftara rað: f.v. Arnbjørn Kristiansen, Trygvi Guttesen, Bergfríð Anthoniussen, Katrin Egholm, Rúna S. Olsen, Oddbjørg Joensen, Randi M. Gunnarsdóttir, lærari, og Julianna Bech Húsgarð*
*Fremra rað: f.v. Ada í Líð, Alma á Lava, Fróði Hammer, Hanna Jacobsen, Martina Eriksen og Herdis Jacobsen*

Mynd: Álvur Haraldsen

Í dag, leygardagin 14. februar kl. 10, letur listaframsýningin "Spírandi list" upp í Smiðjuni í Lítluvík. Hetta er onnur framsýning við sama heiti.

Framsýnararnir hesaferð eru næmingar í Tórshavnar Kvøld – og Ungdómsskúla í Kollafirði, sum ganga til fakið "Tekning og máling" har Randi M. Gunnarsdóttir er lærari.

Teir 13 næmingarnir sum sýna fram hava fleiri ymiskar málningar.

Framsýningin er opin til og við hósdagin 19. februar kl. 19.00

Opið er soleiðis:
leygardagin frá kl. 10-18, sunnudagin frá 15-18, mán-hósd. frá 15-19.



# Ætla at gera eftirskúla í Suðuroy til 60-80 ungfólk

**Skúlin fer leysliga mett at kosta 40-50 milliónir og ætlanin er, at landið skal betala ein part og allar kommunurnar í Føroyum skulu betala ein part**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Ætlanin er nú at byggja ein nýggjan eftirskúla til ungfólk í Føroyum.

Og ætlanin er, at hann skal byggjast í Suðuroy.

Hesi seinastu fýra árini hevur ein arbeiðsbólkur arbeitt við ætlanini at byggja ein eftirskúla í Suðuroy og nú er komið so langt, at fyrispurningur er sendur kommununum um at bera ein part av kostnaðinum. Ætlanin er at fáa allar kommunurnar í landinum at vera við.

Á bygdaráðsfundi í Porkeri týskvøldið, varð bygdaráðið kunnað um ætlanina og har samtykti bygdaráðið, at verða hinar kommunurnar við í ætlanini, skal Porkeris Kommuna eisini bera sín part.

Teir fýra, sum manna arbeiðsbólkin, sum arbeiðir við ætlanini, eru Ólavur Rasmussen, prestur í Hvalba, Tummas í Dali, studentaskúlalærari á Tvøroyri, Julius Holm, hjálparpedagogur í Vági og Jacob Vestergaard, løgreglumaður á Økrum, sum eisini nýliga hevur verið landsstýrismaður.

### 60-80 næmingar

Í áheitanini á kommunurnar at bera ein part av kostnaðinum, sigur arbeiðsbólkurin, at teir kundu hugsað sær ein eftirskúla til 60-80 næmingar.

Enn er ógjørligt at siga, hvat ein slíkur skúli fer at kosta at byggja.

Men verður mett, at byggingin fer at kosta 40-50 milliónir, er tað neyvan heilt av leið, halda teir.

Ein slíkur eftirskúli er fremst av øllum ætlaður føroyskum ungdómi um alt landið, siga teir í arbeiðsbólkinum og meiningin er, at næmingarnir skulu búgva á skúlanum.

Teir vísa eisini á, at eftir lógini um eftirskúlar, betalir landið 50% av byggingini og 70% av rakstrinum.

Teir siga, at ein leistur kundi verið, at kommunurnar kring landið betala sín part av byggingini eftir fólkatalinum.

Av tí, at landið rindar helvtina, verða 20-25 milliónir eftir til allar kommunurnar at betala.

Arbeiðsbólkurin hevur sostatt roknað út, at fyri Tórshavnar Kommunu hevði hetta merkt, at hon kom at betala 2,5-3 milliónir um árið í trý ár, ella 8-9 milliónir tilsamans til byggingina. Men Havnin er so stór, at Tórshavnar Kommuna hevði komið at betalt ein triðing av kostnaðinum, ella gott tað.

Verða allar kommunurnar í Suðuroy við, merkir tað, at tær koma at betala tríggjar milliónir tilsamans.

Men so leggja teir afturat, at verður skúlin veruleiki, má ein serlig skipan gerast fyri næmingar úr teimum kommunum, sum ikki betala sín part av bygginini.

Tá ið kommunurnar hava tikið støðu til, um tær vilja vera við, er ætlanin at velja eina nevnd fyri eftirskúlan. Ein møguleiki hevði verið at valt umboð fyri mentamálaráðið, kommunurnar, arbeiðsbólkin fyri eftirskúlan og kanska eisini vinnufeløgini, í eina slíka nevnd.

### Byggjast í Hovi

Á bygdaráðsfundinum í Porkeri varð upplýst, at fleiri kommunur høvdu sagt seg vera sera áhugaðar í ætlanini.

Fleiri føroyskir ungdómar fara uttanlands á eftirskúlar um árið, men tað vildi verðið munandi bíligari at havt ein eftirskúla í Suðuroy.

Fyrireikararnir hava upplýst fyri bygdaráðnum, at fyribils er stungið út í kortið at skúlin verður bygdur í Hovi.

# Smyril sjey tímar seinkaður

**Hann skuldi fara av Havnini mikukvøldið klokkan 22, men fór ikki, fyrrenn klokkan var næstan fimm um morgunin. Men eftir umstøðunum var lagið gott á ferðafólki, sigur Strandferðslan**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Mikukvøldið varð Smyril seinkaður í sjey tímar av Havnini, men bæði tey, sum arbeiða á Farstøðini og skipari og manning á Smyrli, gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at kunna ferðafólk og fyri at fáa alt at glíða undir rættiliga truplum umstøðum, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni*

Tey, sum skuldu úr Havnini til Suðuroyar við Smyrli mikukvøldið, fingu seg rættiliga roynd.

Smyril var á Skála til botneftirlit og eftir ætlan skuldi hann sigla av aftur Havnini til Suðuroyar klokkan 22 mikukvøldið.

Men tá ið teir eru í ferð við at fylla dokkina á Skála, varnast tey, at tey fáa ikki bógskrúvuna á Smyrli at rigga.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at slík brek kunnu vera rættiliga ring at finna, men arbeitt varð av kraft uppá at finna brekið.

Men samstundis varð lýst, at fráferðin av Havnini varð útsett ein tíma.

Men tað gekk strilti at finna brekið, hóast serkøn hjálp eisini kom úr landi og ferðin varð útsett tvær ferðir afturat.

Men tað gekk heldur ikki og so varð avgjørt, at Smyril skuldi sigla klokkan trý um náttina, sama um bógskrúvan fekst at rigga ella ikki.

Men beint áðrenn klokkan 3 varð feilurin funnin og tí varð gjørt av at rætta hann.

Endin varð, at Smyril slapp ikki úr dokkini, fyrrenn klokkan var fýra um náttina og klokkan 4.50 sigldi Smyril av Havnini.

### Kunnaðu ferðafólkið

Tað eina kvøldið beint fyri jól varð Smyril hálvan triðja tíma seinkaður úr Havnini og tá varð funnist hvassliga at Strandferðsluni fyri at hon ikki hevði kunnað ferðafólki betri, tí øll tey, sum bíðaðu í bilum at sleppa við, fingu onki at vita.

Tá lovaði strandferðslustjórin, at bøta um støðuna og næstu ferð ein slík seinking tók seg upp, skuldi ferðafólkið kunnast betri.

Og mikukvøldið vórðu tey væl kunnað um tað, sum hendi, sigur hann.

Hann sigur, at tá ið tað varð greitt, at Smyril varð seinkaður, fingu tey fólk oman á Farstøðina at siga og tey greiddu eisini teimum, sum bíðaðu í bilum, frá støðuni.

Kristian Davidsen sigur, at tey á Farstøðini gjørdu ferðafólkunum kaffi og eftir umstøðunum var lagið á ferðafólkinum gott, hóast te bíðaðu í næstan sjey tímar.

– Eg haldi, at bæði tey, sum arbeiða á farstøðini, og skipari og manning á Smyrli, gjørdu eitt rættiliga gott arbeiði undir teimum truplu umstøðunum sum vóru, sigur stjórin á Strandferðsluni.